DANMARKS NATIONALBANK

16. NOVEMBER 2018 — NR. 17

FØROYSKI BÚSKAPURIN

# Økt trýst á arbeiðsmarknaðin

**Nógvur eftirspurningur kroystir arbeiðsmarknaðin**
Størri veiða og høgir laksaprísir hava havt við sær størri privatar og almennar íløgur og nýtslu síðan 2013. Trýstið á arbeiðsmarknaðin er økt hetta seinasta árið, og tað kann viðføra ovurupphiting av búskapinum.

**Fíggjarpolitikkurin eigur at styrkja búskapin**
Fíggjarlógin fyri 2019 eigur at tálma eftirspurninginum til tess at minka vandan fyri ovurupphiting. Møguleikarnir fyri at reka ein støðugan fíggjarpolitikk fara at styrkna, um táttað verður í fíggjarkarmarnar hjá kommununum.

**Fíggjarpolitikkurin skal gerast klárur til framtíðina**
At fólkið verður alsamt eldri tey næstu áratíggjuni ber í sær, at fíggjarpolitikkurin er svikaligur. Stig eiga at verða tikin nú til at økja arbeiðsmegina ella tátta fíggarpolitikkin.

INNIHALD

2 HÁKONJUNKTURURIN TYKIST AT HALDA FRAM
2 FÍGGJARPOLITIKKURIN ØKIR TRÝSTIÐ Á ARBEIÐSMARKNAÐIN
4 VANTANDI ARBEIÐSMEGI
5 ÚTFLUTNINGURIN VEKSUR SERSTAKLIGA AV TEIMUM HÆKKANDI LAKSAPRÍSUNUM
6 ÁHALDANDI VØKSTUR Á BÚSTAÐAR-MARKNAÐINUM
7 FLEIRI ELDRI KROYSTA TANN ALMENNA FÍGGJARSTANDIN
7 SEINNI PENSJÓN ER IKKI NÓG MIKIÐ TIL AT LOYSA TRUPULLEIKAN
8 HÆGRI SKATTUR KANN ØKJA UM HALDFØRI
9 TILVÍSINGAR

**Hákonjunktururin tykist at halda fram**
Føroyski búskapurin veksur framvegis, og lágt arbeiðsloysi leggur trýst á arbeiðsmarknaðin. Tann stóri vøksturin í laksaprísinum og ein størri veiðunøgd, serliga av makreli og sild, eru tær sterkastu drívmegirnar í vøkstrinum síðan 2013. Hetta hevur økt inntøkurnar, og tað hevur havt við sær størri eftirspurning bæði privat og alment. Arbeiðsvirkni er tí munandi vaksið. Vøksturin helt fram inn í fyrru helvt av 2018, tá ið talið á løntakarum vaks støðugt, sb. mynd 1.

Hóast arbeiðsvirkni er vaksið áhaldandi, eru útlit fyri lægri vøkstri í nominellu bruttotjóðarúrtøkuni, BTÚ. Búskaparráðið væntar, at vøksturin í nominella BTÚ'inum verður umleið 2 prosent í 2018, sb. Búskaparráðið (2018). Vøksturin er sostatt væl minni enn seinastu fimm árini, har BTÚ nominelt er farin sløk 7 prosent upp árliga. Talið á arbeiðsleysum er tó lágt og lækkar støðugt. Tí er framvegis vandi fyri, at búskapurin ovurupphitar.

Steðgurin í vøkstrinum í BTÚ kemst serliga av, at býtisviðurskiftini eru versnað av lækkaðu laksaprísunum umframt hækkaðum oljuprísi. Minni framleiðsla av laksi hevur tó eisini ávirkan, umframt væntandi minni fiskiveiða. Minni prísvøkstur í BTÚ í leypandi prísum í 2018 er tí bara í ein ávísan mun tekin um, at vøksturin í realbúskaparliga virkseminum í Føroyum er minkaður. Sum frá líður, kann væntaði inntøkuvøksturin tó minka privata og almenna eftirspurningin, og tað fer sostatt at minka trýstið á arbeiðsmarknaðin.

Vaksandi arbeiðsvirkni og lágar rentur hava økt tær tøku húsarhaldsinntøkurnar munandi. Samstundis hava trivaligar lønarhækkingar og lítil vøkstur í brúkaraprísunum eisini stuðlað keypsorkuni hjá húsarhaldunum, sb. mynd 2. Gongdin í privatu nýtsluni hevur tó verið hóvlig sammett við framgongdina fyrr.

Farna árið hevur m.a innflutningurin av bilum og øðrum varandi nýtsluvørum vaksið um innflutningin, sb. mynd 3. Tað vísir, at privata nýtslan økist. Tann økjandi vøksturin í innflutninginum saman við minkandi fiskaútflutninginum hevur síðan august 2017 tvíbýtt avlopið á handilsjavnanum, sum er minkað niður í 750 mió. kr. (4 prosent av BTÚ).[1]

**Fíggjarpolitikkurin økir trýstið á arbeiðsmarknaðin**
Góðu tíðirnar í føroyska búskapinum hava økt skattainntøkurnar hjá landskassanum og kommununum munandi. Tó eru útreiðslurnar til tey alment løntu samstundis vaksnar, so avlopið á almennu rakstrar-, útbúnaðar- og útlánskontuni er ikki vaksið nóg mikið við atliti at búskaparvøkstrinum.

Vøksturin av alment løntum hevur verið samstundis sum, at privata arbeiðsvirkni er økt, sb. mynd 4. Hetta hevur lagt størri trýst á arbeiðsmarknaðin. Samstundis eru almennu íløgurnar í t.d. undirstøðukervið, sum almenn vinnufeløg fíggja, vaksin meiri enn 20 prosent um árið síðan 2016, sb. Búskaparráðið (2018).

**Nógv búskaparvirksemi fær fleiri fólk í arbeiði** Mynd 1




Kelda: Hagstova Føroya.

**Fakta um Føroyar**

| | |
|---|---|
| Fólkatal (septembur 2018) | 51.060 |
| Bruttotjóðarúrtøka, BTÚ (2017, mia. kr.)[1] | 18,9 |
| Fyri hvønn íbúgva2 (1.000 kr.) | 376,6 |
| Gjaldoyra | Danskar krónur |

Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik, Búskaparráðið og egnar útrokningar.
1. BTÚ er eitt mett tal hjá Hagstovu Føroya og Búskaparráðnum.
2. Samanborið var BTÚ fyri hvønn íbúgva í Danmark 373.000 kr. í 2017

1 Seinastu tølini í gjaldsjavnanum frá 2015 vístu knappar 1,5 mia kr. í avlopi.

**Lønin hækkar skjótari enn brúkaraprísirnir**

Mynd 2




Viðm.: Lønarhækkingin er roknað út við at javna lønina út á talið á løntakararum. Tí er ikki lagt upp fyri broytingum í arbeiðstíð, javnan av arbeiðstíð ella slag av arbeiði. Brúkaraprísirnir eru uttan vakstrarískoyti til rentuútreiðslur til bústaðir.
Kelda: Hagstova Føroya.

**Vøksturin í innflutninginum er øktur tey seinnu árini**

Mynd 3




Viðm.: Innflutningurin er uttan skip og flogfør, sum skiftir nógv, og er frá uttanlandshandilshagtølunum. BTÚ er eitt met fyri 2016-17 og forsøgn hjá Búskaparráðnum í 2018.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Tað almenna hevur styrkt búskaparvøksturin**

Mynd 4




Viðm.: "Privat" eru tey arbeiðsfólk, ið ikki arbeiða í almennari fyrisiting, undirvísing og heilsuverkinum. Dáta fyri 2018 er miðaltal fyri fyrstu átta mánaðirnar í árinum.
Kelda: Hagstova Føroya.

Landsstýrið eigur at tátta í við fíggjarpolitikkinum til tess at minka trýstið á arbeiðsmarknaðin. Tí er tað positivt, at landsstýrið hevur mælt til at útseta nakrar byggi- og verklagsætlanir í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2019. Haraftrat eiga  landsstýrið og kommunurnar at hugsa um, hvørt nakrar av teimum stóru íløguætlanunum kunnu útsetast. Nýggj framtøk, ið økja útreiðslurnar hjá landskassanum ella kommununum, eiga at verða fíggjað við varandi skattahækking ella sparing aðrastaðni.

Tað er einki nýtt fyribrigdi, at nýtsla og íløgur hjá tí almenna ávirka trýstið á arbeiðsmarknaðin, tá ið hákonjunkturur er í Føroyum. Metingar hjá Búskaparráðnum hava víst, at søguliga hevur fíggjarpolitikkurin styrkt sveiggini í føroyska búskapinum, sb. Búskaparráðið (2015b).

Tað er serliga í kommununum, at rakstrarútreiðslurnar vaksa samstundis sum skattainntøkurnar. Hetta skal m.a. verða skilt út frá teimum stovnsligu karmunum. Mótsett Danmark verða ongar árligar fíggjaravtalur gjørdar millum landsstýrið og kommunurnar, har karmarnir fyri vøkstrinum í teimum kommunalu útreiðslunum verða ásettir. Rásarúmið hjá kommununum er bara avmarkað, tá ið tær skulu læna pengar, og hetta verður ikki gjørt við atliti at búskaparligu konjunkturunum.

Tað hevði gagnað at broytt teir fíggjarpolitisku karmarnar, so at fíggjarætlanirnar hjá landi og kommunum vórðu ásettar við bindandi avtalum. Tað hevði kunnað gjørt sítt til, at tann búskaparliga gongdin verður støðugari í framtíðini.

## Vantandi arbeiðsmegi

Arbeiðsvirkni er vaksið 14 prosent síðan miðskeiðis í 2013. Fjórða hvørt nýtt starv er kveikt í ávíkavist byggivinnuni og hjá tí almenna. Tað almenna eigur kortini í roynd og veru tann størra partin av vøkstrinum í búskaparvirkseminum. Tað kemst av, at ein partur av tí vaksandi arbeiðsvirkninum í t.d. byggivinnuni stendst av teimum ógvuliga stóru almennu verkætlanunum í til dømis havna- og tunnilsgerð.

Tað vaksandi talið á ferðafólkum hevur elvt til, at hotell- og matstovuvinnan er vaksin 35 prosent síðan fyrst í 2017. Haraftrat kemur avleitt árin á aðrar vinnur og av at leiga privat heim út. Hóast ferðavinnan er lítil enn, er hon við til at gera føroyska búskapin meira fjølbroyttan.

Vøksturin í arbeiðsvirkninum hevur fingið arbeiðsloysið niður á 1,6 prosent í august. Tað er tað minsta í tíggju ár og bendir á, at arbeiðsmarknaðurin er spentur. Tá íð tey búskaparligu viðurskiftini broytast, umráða føroyingar seg tó øðrvísi enn fólk í øðrum londum. Tað gera teir við at flyta til landið ella av landinum, og sostatt kunnu arbeiðsloysitøl ikki beinleiðis sammetast við tøl í t.d. Danmark. Teir góðu starvsmøguleikarnir á føroyska arbeiðsmarknaðinum tey seinnu árini hevur tí – sum í hákonjunkturum fyrr – víðkað arbeiðsfjøldina, tí serstakliga útisetar eru fluttir aftur til Føroya, sb. mynd 5.

Tað lítla arbeiðsloysið er ein avbjóðing hjá fyritøkunum, sum alsamt oftari boða frá, at vantandi arbeiðsmegi tarnar framleiðsluna. Tað er serliga galdandi í byggivinnuni, sb. mynd 6. Tað kann gera tað torført at útvega arbeiðsmegi til eitt nú bústaðarbygging, sum er umráðandi fyri at tálma teimum vaksandi bústaðarprísunum í Tórshavn, ið m.a. stendst av tí stóru nettotilflytingini til Føroya.

**Lítið arbeiðsloysi dregur føroyingar heimaftur**

Mynd 5




Viðm.: Nettotilflytingin fevnir serliga um fólk við donskum ríkisborgararætti. Hetta bendir á, at tað eru føroyingar í Danmark, sum flyta heim.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Fyritøkunum vantar arbeiðsmegi**

Mynd 6




Viðm.: Partur av fyritøkum í vinnuni, ið boðar frá, at vantandi arbeiðsmegi avmarkar framleiðsluna.
Kelda: Hagstova Føroya.

**Útflutningurin veksur serstakliga av teimum hækkandi laksprísunum**
Tann stóri vøksturin í útflutninginum kemst av samanfallandi gagnligu líkindunum í ali- og fiskivinnuni.

Alibrúkini hava selt metnógvan laks fyri høgan prís fimm tey seinastu árini, sb. mynd 7. Tann størsta alifyritøkan, Bakkafrost, væntar, at framleiðslan fer at vaksa støðugt tey næstu árini. Tað er samstundis sum, at fyritøkan ger stórar íløgur í útbúnað á landi, sum økir framleiðsluorkuna av tí, at tíðarskeiðið fyri aling á landi verður longt, sb. Bakkafrost (2018).

Størri altjóða framleiðsla hevur í seinastuni minkað prísin eftir eitt áramál við sjúkueyðkennum í m.a. Chile sb. Sameindu Tjóðir (2018). Altjóða eftirspurningurin er framvegis stórur, og útflutningsprísurin fyri laks var yvir summarið 40 prosent hægri enn í 2013. Væntaði vøksturin í framleiðsluni í Føroyum kann javna møguliga minni laksaprís á heimsmarknaðinum í framtíðini.

Góður fiskiskapur hevur gagnað fiskivinnuni, og tey seinnu árini hevur prísurin verið stak góður, sb. mynd 8. Serliga uppsjóvarfiskur sum makrelur og sild hevur elvt til ta positivu gongdina. Hinvegin hevur botnfiskaveiðan, toskur, hýsa og upsi verið lakari, og prísurin lægri, sb. Ríkisumboðið (2018).

Uppsjóvarveiðan er tó sum heild eitt sindur minni í 2018 enn undanfarnu árini. Tað kemst av minni kvotum, tí serliga makrel- og sildastovnurin er skerdur sambært tilmæli frá altjóða fiskifrøðingum í International Council for the Exploration of the Sea, ICES, sb. ICES (2018a, 2018b, 2018c). Tilmælini vísa á, at makrelkvoturnar eiga at skerjast uppaftur meira í 2019, men at sildaveiðan kann økjast, ICES (2018).

Botnfiskakvoturnar í føroyskum sjógvi vóru sum heild óbroyttar í 2018. Kvoturnar í 2019 eru ikki ásettar enn, men serliga toska- og hýsustovnurin mennist, sb. ICES (2018d, 2018e, 2018f).

Vøksturin í fiskaútflutninginum seinastu árini hevur serliga verið á russiska marknaðinum, sb. mynd 9. Tað vísir eina betri marknaðaratgongd, síðan Russland lýsti handilsbann fyri matvørur úr ES og nøkrum øðrum londum afturfyri teirra revsitiltøk.

**Laksaprísurin er nógv uppfarin síðan 2013** Mynd 7




Viðm.: Árliga broytingin í úflutninginum er býtt sundur í broytingar í prísi og nøgd og summerar bara lutvíst.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Betri fiskiskapur hevur gagnað fiskivinnuni í framgongdini** Mynd 8




Viðm.: Árlig broyting í útflutninginum er mett og er javnað á broyting í prísi og nøgd.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Stórur vøkstur í útflutninginum til Russlands** Mynd 9




Viðm.: ES27 er uttan Danmark
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Føroyar eru ikki limir í ES, og tí eru hesi tiltøk ikki til bága fyri landið. Tað hevur eisini borið í sær hægri avrokningarprísir fyri føroyskan fisk. Tað kann tí verða ein bági fyri føroyskan útflutning, um viðurskiftini millum Russland og ES verða normaliserað aftur. Samanumtikið er føroyskur útflutningur tó meiri geografiskt víðkaður nú enn fyri 15-20 árum síðani.

Í juni herdi vinnumálaráðharrin kapitalkrøvini fyri peningastovnar við fíggjarligari eksponering í Føroyum, tann sokallaði systemiski buffarasatsurin, sb. Erhversministeriet (2018). Endamálið við buffaranum er at styrkja peningastovnarnar mótvegis stórum sveiggjum í føroyska búskapinum. Sveiggini kunnu møguliga verða ógvislig, av tí at bygnaðurin í vinnuni ger búskapargongdina so treytaða av fiskaútflutninginum, sb. boks 1.

**Áhaldandi vøkstur á bústaðarmarknaðinum**
Tær lágu renturnar og vøksturin í tøku inntøkunum hjá fólki hava stuðlað upp undir húsamarknaðin tey seinnu árini, sb. mynd 10. Prísirnir eru hækkaðir serliga í Tórshavn, tí at tann stóra tilflytingin til Føroya hevur havt við sær ein øktan eftirspurning eftir bústøðum har. Tey seinastu tølini, sum tó hava eina stóra óvissu knýtta at sær, benda tó á, at vøksturin á bústaðarmarknaðinum hevur breitt seg út um allar Føroyar. Samstundis eru bústaðarprísirnir í Tórshavn eitt sindur tálmaðir.

Vaksandi bústaðarprísir kunnu føra við sær eyka vøkstur í útlánum til húsarhaldini. Húsaprísir eru ein leiðandi ábending um kredittvøkstur í summum

**Búskapurin er viðbrekin, tí hann er so bundin at fiskivinnuni** Boks 1

Føroyski búskapurin er lítil og opin sammett við umheimin, og hann er miðsavnaður um ráfiskaútflutning. Sostatt standa fiski- og alivinnan fyri einum sættingi av øllum bruttovirðisvøkstrinum í Føroyum og so at siga øllum vøruútflutninginum. Tí er virksemið í Føroyum viðbrekið fyri broytingum í fiskastovnum og -prísum, ið sveiggja nakað við tíðini, men ikki neyðturviliga sama veg fyri ymiskan fiskiskap og ymisk fiskasløg.

Inntøkurnar javna seg alsamt meira á ymiskar fiskivinnugreinar. Tað ger í ein ávísan mun búskapin minni viðbreknan sum heild. Føroyingar sleppa eisini at fiska í fremmandum sjógvi sambært avtalum við onnur lond, sb. Malthe-Thagaard (2017). Hetta kann gera Føroyar minni bundnar at fiskastovnunum í egnum sjógvi og styrkja búskapin mótvegis sveiggi í stovnunum. Haraftrat fer vøksturin í ali- og ferðavinnuni helst at styrkja búskapin.

Hetta broytir tó ikki ta yvirskipaðu myndina av einum búskapi, sum av og á fer at sveiggja nógv. Haraftrat kann minkandi fiskiskapur beinleiðis og óbeinleiðis elva til miss hjá peningastovnunum og herða sveiggini í realbúskapinum. Hetta vísir, hvussu alneyðugur ein støðufastur fíggjarpolitikkur er.

**Í hákonjunkturinum eru húsaprísirnir hækkaðir mest í Tórshavn** Mynd 10




Viðm.: Miðaltal fyri handlaði hús, har lutvíst er lagt upp fyri slagi av húsum fyri at tryggja, at prísurin vísir gongdina fyri ein vanligan bústað. 2018 fevnir bara um 1. hálvár og tí eina avmarkaða nøgd av handlum.
Kelda: Hagstova Føroya og Betri Heim.

londum, m.a. Danmark, sb. Grinderslev vfl. (2017). Higartil hevur útlánsvøksturin til bæði húsarhald og vinnu í føroyskum og donskum peningastovnum kortini verið hóvligur.

Framgongdin er sostatt í fyrstu atløgu sterkari enn framgongdir fyrr. Summar av teimum privatu og almennu fyritøkunum fíggja tó sínar stóru íløgur við útlendskum lánum og síggjast ikki aftur í javnanum hjá føroyskum ella donskum peningastovnum.

**Demografiskt androk veksur** Mynd 11




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Fleiri eldri kroysta tann almenna fíggjarstandin**
Sum mong onnur lond eru Føroyar fyri stórum avbjóðingum til tess at tryggja javnvág millum inntøkur og útreiðslur í almennu fíggjarætlanunum í framtíðini. Tað kemst m.a. av, at talið á eldri veksur, og sostatt vaksa útreiðslurnar til pensjónir og heilsuverkið, sb. mynd 11. Samstundis minka skattainntøkurnar, tí færri fólk eru í tí arbeiðsføra aldrinum.

Føroyar kunnu tó vænta sær eitt sindur størri avbjóðingar í almenna fíggjarstandinum enn fleiri onnur lond. Parturin av fólki í arbeiðsførum aldri er t.d. eini 5 prosentpoint minni enn í Danmark, sb. Ellermann-Aarslev vfl. (2018). Sambært fólkaforsagnunum verður munurin størri til miðskeiðis í hesi øldini. Hóast stóra føroyska burðartalið stigvíst økir talið á arbeiðsførum fólki, eru framrokningarnar treytaðar av, at nettoútflytingin verður verandi ájavnt við miðaltalið síðan 1985, sb. Búskaparráðið (2015a). Framrokningar í fólkatalinum eru sum vera man óvissar, serliga gongdin í burðartalinum og nettotilflytingini. Hetta broytir tó ikki myndina av, at føroyski búskapurin er í hørðum demografiskum andgletti. Tí fer tað almenna hallið væntandi at vaksa støðugt tey næstu 40 árini, um landsstýrið ikki fremur nýskipanir.

Búskaparráðið metti í 2015, at brúk er fyri einum varandi strangari fíggjarpolitikki upp á 5 prosent av BTÚ fyri at tryggja ta almennu nettoskuldina.

**Seinni pensjón er ikki nóg mikið til at loysa trupulleikan**
Tað er ein týðandi møguleiki at økja arbeiðsvirkni millum fólk, sum eru eldri enn galdandi pensjónsaldurin, 67 ár. Tey hava munandi minni tilknýti til arbeiðsmarknaðin enn restin av vaksnu íbúgvunum, sb. mynd 12. Tí avráddi Løgtingið í 2018 at hækka pensjónsaldurin eitt ár inntil 2030. Síðani fer pensjónsaldurin at fylgja gongdini í livialdrinum. Her er tó tað hámark, at pensjónsaldurin í mesta lagi hækkar eitt hálvt ár fimta hvørt ár. 20 tey seinastu árini er metti livialdurin vorðin dupult so høgur. Heldur gongdin fram, kann loftið í raðfestingini við vísitølum hava við sær, at talið á árum við pensjón veksur áhaldandi.

Pensjónsaldurin fer við galdandi reglum at vera 70 ár í 2050, um livialdurin veksur við somu ferð sum higartil. Til sammetingar verður pensjónsaldurin í Danmark væntandi 72 år, sb. Fíggjarmálaráðið (2018). Tann lutvísa indekseringin til livialdurin er eitt týðandi stig á røttu kósini at tryggja ein haldgóðan fíggjarpolitikk. Búskaparráðið metti tó í 2015, at hægri pensjónsaldur í ætlaða støddarstigi loysir bara ein fjórðapart av haldføristrupulleikanum.[2]

Teir góðu konjunkturarnir og tað stóra avlopið hjá fiskivinnuni eru eitt gott høvi at fara við avbjóðingunum í fíggjarpolitiska haldførinum.

Umframt at hækka pensjónsaldurin er ikki stórvegis møguleiki at økja um vinnutíttleikan. Tað eru longu

2 Búskaparráðið (2015a) metti, at ein hækkaður pensjónsaldur úr 67 upp í 72 ár fram til 2048 kann bøta haldførið við 1,9 prosenti av BTÚ.

fleiri, bæði kvinnur og menn, á arbeiðsmarknaðinum enn í fleiri øðrum londum, sb. mynd 13. Hóast vinnutíttleikin fyri kvinnur er høgur, arbeiddi yvir helvtin tó parttíð í 2013. Tað kann tí verða ein møguleiki, hóast avmarkaður, at hækka útboðið av arbeiðsmegi við at lata kvinnurnar arbeiða longri.

**Hægri skattur kann økja um haldføri**
Broytingar í skattaskipanini kunnu eisini gagna fíggjarpolitiska haldførið munandi. Skattatrýstið í Føroyum er minni enn í Danmark.

Landsstýrið eigur fyrst og fremst at tryggja landskassanum ein størri part av úrtøkuni hjá fiskivinnuni við tilfeingisrentuni. Tann lætta og bíliga atgongdin til fiskiloyvini kann útvega vinnuni avlop, sum er størri enn avlopið í virksemum á einum opnum og fríum marknaði við samsvarandi vága. Tað kann eisini hava við sær, at hýran hjá manningina á hesum fiskiførum er hægri enn lønin hjá fólki í øðrum vinnum, tá ið lagt verður upp fyri vanda og bága, ið kann standast av arbeiðinum umborð á skipi.

Løgtingið samtykti í desember 2017 eina broyting í kvotuskipanini, so at ein avmarkaður partur verður seldur á uppboðssølu, sb. boks 2. Hetta er eitt skilagott stig til eina meiri marknaðarlagaða skipan, ið tryggjar landskassanum ein størri part av tilfeingisrentuni. Tilfeingisgjaldið fyri restina av kvotupartunum fylgir framvegis ikki tí marknaðarprísinum, ið verður ásettur á uppboðssølunum. Uppboðssølurnar kundu verið smidligari og gagnligari við at økja teir kvotupartarnar, sum verða bjóðaðir út, og við at geva útlendingum høvi til at bjóða.

Samanumtikið er møguleiki fyri at økja inntøkurnar hjá landskassanum av fiskivinnuni. Tað kann vera ein týðandi og haldgóð fíggjarpolitisk bjálving komandi áratíggju.

Tann føroyska skattaskipanin kann eisini skipast øðrvísi á fleiri øðrum økjum fyri at tryggja eina nóg stóra skattainntøku, um sleppast skal undan at skerja tað almenna.

Føroyskir bústaðareigarar gjalda hvørki grund- ella ognarskatt. Haraftrat rindar landskassin 35 prosent av húsalánsrentunum við stuðli upp í 100.000 kr. í mesta lagi. Tær lágu renturnar hava við sær, at hámarkið er ikki bindandi fyrr enn húsini eru fult lánsfíggjað fyri umleið 10 mió. kr. Tað eru sera fá so dýr hús í Føroyum. Tey lagaligu skattaviðurskiftini hjá húsaeigarum halda húsaprísunum uppi.

**Hægri pensjónsaldur kann økja arbeiðsfjøldina** Mynd 12

Tal á arbeiðsvirknum eftir aldri




Viðm.: Tal á løntakarum í hvørjum aldursbólki. Tølini leggja tí ikki upp fyri teimum, ið arbeiða uttanlands og ikki eru skattskyldug ella sjálvstøðug.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Nógv arbeiðsvirkin fólk í Føroyum** Mynd 13

Vinnutíttleiki,16-66 ár, prosent




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

**Fiskivinnunýskipan** Boks 2

Meginreglurnar í nýskipanini líkjast uppskotinum hjá landsstýrinum, ið varð gjøgnumgingið í greiningini frá í fjør, sb. Malthe-Thagaard (2017).

Kvotupartarnir, ið verða seldir á uppboðssølu, eru tó fyri summi fiskasløg minkaðir úr 25 prosentum niður í 15 prosent. Eru kvotunar størri enn í 2018, verða allar eykakvotur seldar á uppboðssølu. Eftir nýggju reglunum kunnu útlendingar ikki eiga kvotur. Skiftisskipanin, ið skal avtaka verandi útlendsk ognarviðurskifti í føroyskum fiskikvotum, er longd úr 4 árum til 6 ár við atliti at tí upprunaliga uppskotinum.

Teir høgu húsaprísirnir eru eitt gott høvi til at gera eina nýskipan, sum minkar rentustuðulin og áleggur ein húsaskatt. Samanumtikið kann hetta gera sítt til at betra fíggjarstandin. Samstundis kann ein bústaðarskattur styrkja bústaðarmarknaðin, um hann verður soleiðis skipaður, at skatturin fylgir húsaprísunum, sb. Hviid og Kramp (2017).

Nógvir føroyingar, sum búgva í Føroyum, arbeiða uttanlands, m.a. tí at lønirnar uttanlands eru hægri, og skattafrádrátturin er stórur. Landsstýrið kann minka frádráttin og soleiðis lutvíst økja skattainntøkurnar og lutvíst tálma vantandi arbeiðsmegini. Tað kann tryggja betri samsvar við eykaútreiðslurnar av m.a. dupultum húsarhaldi, sum í roynd og veru er ein avleiðing av at arbeiða uttanlands og hava sín upprunaliga bústað í Føroyum.

## Tilvísingar

Bakkafrost (2018), Interim Report Q2.
Sameindu Tjóðir (2018), Price volatility continues to affect farmed salmon sector as new records are breached once again, *Market Reports*, oktober http://www.fao.org/in-action/globefish/market-reports/resource-detail/en/c/1156020/

Ellermann-Aarslev, Christian, Tina Saaby Hvolbøl og Erik Haller Pedersen (2018), Væksten i velstand er i demografisk modvind, *Danmarks Nationalbank Analyse*, nr. 1, januar.

Erhvervsministeriet (2018), Meddelelse om forhøjelse af den systemiske risikobuffer for eksponeringer på Færøerne, 25. juni.

Finansministeriet (2018), Svar på Finansudvalgets spørgsmål nr. 386 (Alm. del) af 6. juni 2018 stillet efter ønske fra Benny Engelbrecht (S), 2. juli.

Búskaparráðið (2015a), *Frágreiðing*, vár.

Búskaparráðið (2015b), *Frágreiðing*, heyst.

Búskaparráðið (2018), *Frágreiðing*, heyst.

Grinderslev, Oliver, Paul Lassenius Kramp, Anders Farver Kronborg og Jesper Pedersen (2017), Financial Cycles: What are they and what do they look like in Denmark?, *Danmarks Nationalbank Working Paper*, nr. 115, juni.

Hviid, Simon Juul og Paul Lassenius Kramp (2017), Aftale om boligskat stabiliserer boligpriser, *Danmarks Nationalbank Analyse*, nr. 14, september.

ICES (2018a), Herring (Clupea harengus) in subareas 1, 2, and 5, and in divisions 4.a and 14.a, Norwegian spring-spawning herring (the Northeast Atlantic and the Arctic Ocean), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Northeast Atlantic and Arctic Ocean)*, version 2, oktober.

ICES (2018b), Mackerel (Scomber scombrus) in subareas 1-8 and 14, and in Division 9.a (the Northeast Atlantic and adjacent waters), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Ecoregions in the Northeast Atlantic and Arctic Ocean)*, version 2, oktober.

ICES (2018c), Blue whiting (Micromesistius poutassou) in subareas 1-9, 12, and 14 (Northeast Atlantic and adjacent waters), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort, Ecoregions in the Northeast Atlantic and Artic Ocean*, september.

ICES (2018d), Cod (Gadus morhua) in Subdivision 5.b.1 (Faroe Plateau), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Faroes Ecoregion)*, juni.

ICES (2018e), Saithe (Pollachius virens) in Division 5.b (Faroes grounds), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Faroes Ecoregion)*, juni.

ICES (2018f), Haddock (Melanogrammus aeglefinus) in Division 5.b (Faroes grounds), *ICES Advice on fishing opportunities, catch, and effort (Faroes Ecoregion)*, juni.

Malthe-Thagaard, Sune (2017), Højkonjunktur og pres på arbejdsmarkedet, *Danmarks Nationalbank Analyse (Færøsk økonomi)*, nr. 17, september.

Ríkisumboðið í Føroyum (2018), *Frágreiðing.*

## OM ANALYSE

Som en konsekvens af Nationalbankens rolle i samfundet udarbejdes analyser af økonomiske og finansielle forhold.

Analyserne udkommer løbende og omfatter bl.a. vurderinger af den aktuelle konjunktursituation og den finansielle stabilitet.

Analysen består af en dansk, engelsk og færøsk version. I tilfælde af tvivl om oversættelsens korrekthed gælder den danske version.

DANMARKS NATIONALBANK
HAVNEGADE 5
1093 KØBENHAVN K
WWW.NATIONALBANKEN.DK

Redaktionen er afsluttet
12. november 2018

**Sune Malthe-Thagaard**
Economist

ØKONOMI OG PENGEPOLITIK

DANMARKS NATIONALBANK